# Vælkomin á Fiskivinnumessuna North Atlantic Fish Fair 2003

Tað er at fegnast um at Fiskivinnumessan aftur í ár hevur fingið góða undirtøku ímillum vinnuna her á landi og í londinum rundan um okkum.

Vit minnast við stoltleika aftur á Fiskivinnumessuna fyri tveimun árum síðani sum fekk dygga undirtøku bæði frá vinnuni og vitjandi.

Tað at fiskivinnan og onnur vinnna kann koma saman um slíkar messur er at fegnast um, tað er ongin yvi um at tað hevur stóran týdning at vinnulívið her á landi og í grannalondinum kann koma saman á ein slíkan hátt fyri at vísa fram vørur og tænastur. Fiskivinnan er okkara fundament okkara høvuðsvinna og hevur ein slík Fiskivinnumessa áhuga fyri flest allar Føroyingar.



Og tað at tær Føroysku fyritøkurnar hava tikið so væl undir við Fiskivinnumessuni er at fegnast um, vit eiga nógvar góðar fyritøkur sum veita tænastur til fiskivinnuna.

Ikki minst er at fegnast um at nýggja flaggskip Føroyinga NORRÖNA kemur at verða hotelskip dagarnar ímeðan messan verður. Runavíkar Býráð vil ynskja reiðaríði og manning góða eyðnu við skipinum.

Býráðið hevur verði við til at skipa so fyri at karmarnir um Fiskivinnumessuni 2003 skulu verða so góðir sum møguligt og vilja vit ynskja tykkum øllum sum luttaka eins og vónandi nógvu gestinum nakrar góðar dagar í Runavíkar Kommunu, vinnununi og hesum ríka landi at gagni.

Eg fari vegna Runavíkar býráð at ynska øllum vælkomnum á Fiskivinnumessuna 2003

*Rodmundur*

## Vælkomin til North Atlantic Fish Fair 2003

Á øðrum sinni ynskja vit at bjóða framsýnarum og vitjandi vælkomin til altjóða fiskivinnuframsýningina, North Atlantic Fish Fair.

Fyrsta framsýningin varð hildin í 2001, og við umleið 7.000 vitjandi úr 19 londum var hetta eitt væleydnað tiltak.

Endamálið við framsýningini er at skapa møguleikar hjá føroyskum fyritøkum við tilknýti til fiski- og alivinnuna at sýna fram sýnar tænastur fyri altjóða marknaðinum – á heimavølli. Og á henda hátt í størri mun kunna um Føroyar og tær fjøltáttaðu tænastur, vit kunnu veita á hesum øki.

Okkara mál er, at hendan framsýningin skal verða eitt afturvendandi tiltak annað hvørt ár.

Tað seinasta árið hevur ein miðvís marknaðarføring av framsýningini verið uttanlands, og er áhugin eisini væl størri fyri tiltakinum hesaferð.

Karmarnir eru betraðir, við tað at øll framsýningin hesaferð er samlað á havnaøkinum, og at vit hesaferð eisini kunnu bjóða gestunum umborð á okkara nýggja og stásuliga ferðamannaskip »Norrönu« sum kemur at virka sum hotelskip hesar dagarnar.

Vón okkara er, at North Atlantic Fish Fair 2003 kann verða við til at gera okkum enn sjónligari á heimskortinum, til frama fyri føroyskt vinnulív.

Við ynski um eina góða framsýning.

*Andrias Jacobsen*
*Áki í Skemmuni*






